Filadelfia
„Himmal á jørð“

# Friður á jørð og í menniskjum góður tokki

Hetta er tann tíðin, tá vit av sonnum byrja at fyrireika okkum til jólini.

Hetta er somuleiðis ein av myrkastu mánaðunum í árinum, og er 22. desember stytsti dagur, har tað einans eru 5 tímar og 1 minuttur ljóst, og so er myrkt. Men síðani byrjar at ganga móti ljósari tíðum, og av sonnum kunnu vit sum kristin gleða okkum, um henda myrka mánaðin, tí at okkum er ein frelsari føddur.

Tá vit lesa yvirskriftina, kann tað fyri onkran tykjast sum eitt sindur romantiskt. Hvussu kunnu vit tosa um frið á jørð og í menniskjum góður tokki í einari tíð, har kríggj og ófriður valdar runt um allan heimin?

Jú, lurta og hoyr hvat Lukas kap. 2, 6-14 sigur: *„Meðan tey nú vóru har, kom tíðin, at hon skuldi eiga. Og hon átti son sín, hin frumborna, og sveipaði Hann og legði Hann í krubbu; tí ikki var rúm fyri teimum í gistihúsinum. Har á leið vóru nakrir hirðar, ið lógu úti á markini og hildu náttarvakt yvir fylgi sínum. Nú stóð eingil Harrans fyri teimum, og dýrd Harrans lýsti rundan um teir; tá vóru teir ógvuliga ræddir. Men eingilin segði*



*við teir: „Óttist ikki! Eg kunngeri tykkum stóra gleði, ið skal verða fyri alt fólkið. Tykkum er í dag Frelsari føddur, sum er Kristus, Harrin, í staði Dávids. Og hetta skulu tit hava til tekin: Tit skulu finna barn, sveipað, liggjandi í krubbu.“ Í somu stund var hjá einglinum stórur himmalskur herskari, ið lovaði Gudi og segði: „Dýrd veri Gudi á hæddini, friður á jørðini, í menniskjum góður tokki!““*

Tað er hetta, ið jólahøgtíðin er um.

Vit minnast, at Jesus Kristus, heimsins frelsari varð føddur.

Eg havi mangan hugsað um, hví Hann varð føddur í einum fjósi og ikki í einari kongaborg, og meiri eg hugsi um tað, meiri sannførd eri eg um, at so hevði Hann verið sum ein jørðiskur kongasonur. Tað, ið eykennir ein jørðiskan kongason er, at tað eru rættiliga fá, ið hava atgongd til viðkomandi.

Men eg trúgvi, at við at lata seg føða í einum fjósi, vísir Hann okkum, at øll hava atgongd. Tað er ongin ov høgur ei heldur nakar, ið er ov lágur at koma til Hann.

Tá ið vit lesa um alt tað, ið hendi hesa náttina, ið Jesus var føddur, hvussu allir himmalsins herskarar vóru í gongd, og hvussu teir vísu menninir høvdu sæð stjørnu Hansara, kunnu vit meir enn gleðast um, at Hann varð føddur fyri at frelsa okkum menniskju. Har er eingin munur á høgum ella lágum, vit eru øll eins fyri Honum.

Jólamánaðurin er serligur á mangan hátt. Vit hugna okkum, vit vitja hvønnannan, og vit arbeiða við at gera alt so hugnaligt sum gjørligt, fyri okkara kæru.

Longu áðrenn desember byrjar, er alt skrýtt við ljósi og jólapynti, og hetta hoyrir líka sum til. Jólini eru somuleiðis tann høgtíðin, ið meir enn aðrar høgtíðir fær okkum at savnast, og tey, ið hava mist onkran av sínum kæru, merkja saknin størri um jólini.

Tá einglarnir kunngjørdu fyri hirðunum í vers 14: „Dýrd verið Gudi á hæddini, friður á jørð, í menniskjum góður tokki!“ so er tað hetta alt snýr seg um. Sum í Himli so á jørð, tað er tað, ið eg meir ella minni lesi út frá hesum ørindi.

Allur desember mánaður hevur eitt mál, og tað er jólahøgtíðin, ið stendur fyri framman. Vit feira jólini í okkara heimum, kirkjum og samkomun, og er hetta nakað serligt.

Hetta er høgtíðin, tá teir flestu útisetar koma heim at halda jól, tí øll vilja verða heima á jólum, og er tað gleðiligt at síggja øll aftur, til nakrar dagar við hugna og gleði.

Hesin Jesus, ið læt seg føða fyri 2024 árum síðani, er líka aktuellur í dag, og er frelsan líka aktuel í dag, sum tá einglarnir kunngjørdu, at okkum er ein frelsari føddur.

Har vit av sonnum kunnu halda eini gleðilig jól, er tá vit hava frelsaran sum miðdepil í okkara lívi og okkara heimi.

Mítt ynski fyri hesa jólahøgtíðina er, at vit av sonnum kunnu uppliva frið á jørð og í menniskjum góður tokki.

Lat okkum hesa jólahøgtíðina taka orðini „friður á jørð og í menniskjum góður tokki“ til okkum, og gera tey til okkara.

Eg fari at enda við at ynskja øllum eini gleðilig jól. ÁO

Gleðilig jól og signað nýggjár!

# DESEMBER 2024

| | | | |
|---|---|---|---|
| Sunnudagur | 1. | Kl. 11.00<br>Kl. 11.30 | **Morgunmøti v. breyðbróting**<br>**Barnamøti**<br>Møtivertar: Kári, David og Nora<br>Ábyrgd/Leiðari: Tummas J.<br>Lovsongsleiðari: Nomi, bólkur I<br>Uppvørpa: Ragnar<br>Ljóðbland: Tummas D.<br>Tulkur: Ragnar<br>Talari: Ása O.<br>Kaffivertar: Kári, David og Nora |
| Mánadagur | 2. | Kl. 20.00 | **Bønarskúlin**<br>Ábyrgd/leiðari: Mariann |
| Mikudagur | 4. | Kl. 10.00 | **Bøn** Ábyrgd/leiðari: Anna |
| Leygardagur | 7. | | **Reingerð:** Merlie og Alex |
| Sunnudagur | 8. | Kl. 11.00<br><br>Kl. 11.30 | **Morgunmøti v. breyðbróting og við innsavning til húsið**<br>**Barnamøti**<br>Møtivertar: Fríðbjørn og Leif<br>Ábyrgd/leiðari: Mariann<br>Lovsongsleiðari: Tummas J.<br>Uppvørpa: Ása Elisabeth<br>Ljóðbland: Sjúrður<br>Tulkur: Høgni<br>Talari: Anna-May<br>Kaffivertar: Fríðbjørn og Leif |
| Mánadagur | 9. | Kl. 20.00 | **Bønarskúlin**<br>Ábyrgd/leiðari: Anna |
| Mikudagur | 11. | Kl. 10.00<br><br>Kl. 18.30 | **Bøn**<br>Ábyrgd/leiðari: Anna<br>**Barna- og ungdómsarbeiði**<br>Ábyrgd: Nomi |
| Leygardagur | 14. | | **Reingerð:** Malena, Eyðbjørg og Jóhan Hendrik |
| Sunnudagur | 15. | Kl. 16.00 | **Jólaveitsla**<br>Møtivertar: No-omi, Marner, Hellen og Sjúrður<br>Ábyrgd/Leiðari:<br>Lovsongsleiðari: bólkur II<br>Uppvørpa:<br>Ljóðbland:<br>Tulkur:<br>Talari:<br>Kaffivertar: No-omi, Marner, Hellen og Sjúrður |
| Mánadagur | 16. | Kl. 20.00 | **Bønarskúlin**<br>Ábyrgd/leiðari: Tummas J. |
| Mikudagur | 18. | Kl. 10.00 | **Bøn** Ábyrgd/leiðari: Anna |
| Leygardagur | 21. | | **Reingerð:** Anna-May, Linda, Miezan og Frida |
| Sunnudagur | 22. | Kl. 11.00 | **Morgunmøti v. jólahugna**<br>Møtivertar: Eyðbjørg og Áshild<br>Ábyrgd/Leiðari: Anna-May<br>Lovsongsleiðari: Nomi, Øll<br>Uppvørpa: Ragnar<br>Ljóðbland: Sjúrður<br>Tulkur: Ragnar<br>Talari:<br>Kaffivertar: Eyðbjørg og Áshild |
| Týsdagur | 24. | Kl. 16.00 | **Jólagudstænasta**<br>Møtivertar: No-omi og Marner<br>Talari: Margreth |

Fyrivarni verður tikið fyri, at broytingar kunnu koma í skránna.

## *Jólaveitslan*

Nógv, um ikki alt, viðvíkjandi jólunum er siðvenja – einki skal broytast – og soleiðis er eisini við jólaveitsluni, sum verður **sunnudagin 15. des. kl.16.00**. Øll eru vælkomin og bjóða endiliga vinum og familju við.

Eingin veitsla uttan góðan mat. Sum vanligt hava vit breyð við viðskera og rísalamande omaná. Vit vilja fegin vita hvør kann koma við hvørjum, so nokk av mati er til øll. **Skriva teg á matarlistan ella tosa við Conny ella Katy.**

Aftaná borðhaldið verður dansað um træið, vit fáa vitjan og børnini fáa pakka.
Vit ynskja øllum eini góð og hugnalig jól.

*Vh Conny*

